## Ingun í Cannes



Dreymurin hjá einum og hvørjum filmselskara er at sleppa til Cannes hesa ársins tíð. Tí nú er filmsstevna har í býnum. Í ár gongur dreymurin út hjá Ingun í Skrivarastovu. Hon fer á filmsstevnu í Cannes sum partur av liðnum handan filmin *Throwing Paint Tins off the Roof*, ið verður sýndur á ShortFilmCorner. Hetta er ein poetiskur heimildarfilmur um ein býling, um byggilistina og samfelagsligu broytingarnar, lýstar við tveimum líkum háhúsum har eysturi í London. Gjøgnum fyrrverandi íbúgvar varpar filmurin ljós á nútíð og fortíð. Filmurin varir 20 minuttir og er tikin í DV 8 formati. Leikstjóri er danska Vibeke Bryld, sum býr og arbeiðir í London. Michael Shepherd hevur filmað og Ingun í Skrivarastovu hevur klipt og co-producerað. Framleiðslufelag er bretska Stampede, sum nýligani gjørt filmin *Inside Hamas*. Filmurin *Throwing Paint Tins off the Roof* verður eisini sýndur á CPH:DOX 7.-16. november 2008. (Kelda: www.birkblog.blogspot.com)

## 60 ára stovningarveitsla Tjóðveldsins

22. og 23. mai 1948 bleiv Tjóðveldisflokkurin stovnaður. Tað eru 60 ár síðani, og verður hetta markerað við kvøldsetu hóskvøldið 22. mai og veitslu á Hotel Føroyum leygarkvøldið 24. mai. Úr Tjóðveldinum siga tey, at veitslan verður fyri øllum, og at freistin at tekna seg er 20. mai.

# Neyðugt við krøvum um útlát

**- Hóast samlaða føroyska útlátið er 9% hægri í 2006 enn í 1990, er tað áhugavert, at útlátið árini 2001-2006 er minkað við 3%. Nú verður spennandi at síggja, hvønn veg tað fer at fara, men greitt er, at uttan krøv um minkandi útlát, náa vit ongantíð málinum, sigur Jóhanna Olsen, deildarleiðari á Umhvørvisstovuni**

ÚTLÁT
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*




*Tað var Jóhanna Olsen, deildarleiðari, sum hevði framløguna um føroyskt útlát fyri Umhvørvisstovuna*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

Á tíðindafundi á Umhvørvisstovuni í morgun, legði Jóhanna Olsen, deildarleiðari, fram nýggjastu tølini, sum við verandi talgrundarlagi lýsa føroyska útlátið av veðurlagsgassum.

Nú nýggj tøl eru tøk, hevur stovnurin eisini lagt tey fram fyri løgtings- og landsstýrisfólkum.

At Føroyar hava tikið undir við veðurlags-sáttmálanum, merkir, at vit hava skyldu til at fráboða útlátið av veðurlagsgassum til altjóða klimapanelið IPCC, sum tað verður rópt.

Seinasta føroyska fráboðanin um útlát, sum latin er IPCC, er fyri tíðarskeiðið 1990-2001.

### Útlátið er økt

Nýggjastu tølini hjá Umhvørvisstovuni vísa eina lítla minking í samlaða útlátinum hjá Føroyum samanborið við seinastu uppgerð.

Sambært tølunum, sum stovnurin fær frá Hagstovu Føroya, hevur útlátið av veðurlagsgassum í 2006 verið umleið 3% minni enn útlátið í 2001.

Hyggja vit at broytingunum, sum verið hava árini 1990-2006, vísa hagtølini, at útlátið hjá akførum er økt 18%, hjá skipaflotanum er talan um ein vøkstur upp á 16%, men hjá húsarhaldum er útlátið heili 21% minni í 2006 enn í 1990.

- Samlaða útlátið av veðurlagsgassum hjá Føroyum er árini 1990-2006 økt við umleið 9%, sigur Jóhanna Olsen.

### Hagtalsgrundarlag

Samstundis, sum Umhvørvisstovan hevur lagt nýggju tølini fyri myndugleikar og almenningin, ásannar stovnurin, at hagtalsgrundarlagið ikki er nóg dygdargott.

- Dygdin í hagtølunum er svingandi, og tí er grundarlagið fyri ávísar bólkar eisini ov vánaligt. Men hetta eru tó tey frægastu og bestu hagtøl, sum eru tøk í dag.

Jóhanna vísti á, at tað kanska serliga er í fiskiflotanum, at hagtølini ikki eru nóg góð.

- Vit hava tveir útbjóðarar av olju, og tað er ymiskt, hvussu teir skráseta tølini og uppgeva tølini til Hagstovu Føroya. Tí verður neyðugt við krøvum um, hvussu hesi tøl skulu skrásetast.

Hon segði, at tá ræður um útlát, sum skal takast við upp í føroysku tølini, er bert talan um skip og flogfør, sum eru í føroyskum øki – og ikki ímillum lond.

- Føroysku hagtølini skulu einans vísa útlátið í føroyskum øki. Tí verður neyðugt í framtíðini at skipa tølini eftir IPCC-veðleiðingini, segði hon.

### Einki er gjørt

Jóhanna Olsen segði, at tá veðurlagshagtølini vórðu uppgjørd seinast, varð eisini víst á, at dygdin í hagtølunum var ov vánalig.

- Saman við teirri uppgerðini vóru tilmæli um, hvussu dygdin í tølunum kundi betrast, men í hesum tíðarskeiði er einki gjørt við hetta. Soleiðis eru somu ivamál galdandi fyri nýggjastu hagtølini.

Spurd, um hesi ivamál í hagtølunum eisini verða fráboðað IPCC, segði hon, at tað verða tey.

Deildarleiðarin segði, at hóast samlaða føroyska útlátið er 9% hægri í 2006 enn í 1990, er tað áhugavert, at útlátið árini 2001-2006 er minkað við 3%.

- Nú verða spennandi at síggja, hvønn veg tað fer at fara, men greitt er, at uttan krøv um minkandi útlát, náa vit ongantíð málinum, segði Jóhanna Olsen.

### 17% ov høgt

Ronnie Thomasen, sum starvast á Umhvørvisstovuni, segði á tíðindafundinum, at skuldu Føroyar átikið sær tær skyldur, sum fylgja Kyoto-protokollini, kunnu vit í stuttum siga, at føroyska útlátið av veðurlagsgassum í dag er 17% ov høgt.

- Sambært hagtølunum er samlaða føroyska útlátið í 2006 9% hægri enn í 1990, men tað skuldi verið 8% lægri enn í 1990. Vit kunnu tí stuttum siga, at munurin er 17%, sum føroyska útlátið er ov høgt, segði Ronnie Thomasen, sum annars fegnaðist um, at útlátið hjá føroysku húsarhaldunum er minkað munandi, eins og eitt nú Elfelagið SEV hevur minni útlát í 2006 enn í 1990.



*Jákup Pauli Joensen er stjóri á Umhvørvisstovuni. Undir liðini á honum situr Ronnie Thomasen*

*Mynd: Jens Kr. Vang*